# Hálvfinalupláss við 7-tumma seymi

**LØGMANSSTEYPIÐ** B36 negldi tíðliga fyri ímóti FC Hoyvík. At koyra B36 á niðara vøll hjálpti einki hjá FC Hoyvík, tá samanum kom

Heri Simonsen

Hóast átta FC Hoyvík spælarar eiga eina fortíð í B36, so spardu teir sum eiga nútíðina í B36 ikki uppá krútið, tá FC Hoyvík tók ímóti B36 í fjórðingsfinaluni í kappingini um løgmanssteypið. Áðrenn ein tími var farin, var støðan 7-0 til B36, og alt var langt síðani avgjørt. Tá vóru tankarnir hjá árstalsfelagnum rættaðir ímóti komandi umfarinum í vodafonedeildini, og FC Hoyvík slapp at pynta um tá 73 minuttir vóru farnir. FC Hoyvík brutu ígjøgnum í høgru síðu, har Uni Holm Johannesen, sendi eitt innlegg innfyri. Har eydnaðist tað Sunnleifi Midjord at pynta um tað endaliga úrslitið.






**KLASSAMUNUR**

*Royndu menninir hjá hvíta árstalsfelagnum vóru ein ov stórur bita hjá FC Hoyvík*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Á niðara vøll

Fróði Danielsen, formaður í FC Hoyvík segði við Portalin leygarkvøldið, at teir høvdu valt at leggja dystin á niðara vøll í Gundadali, tí tað var teirra fasti heimavøllur. Hann metti, at tað var ein ítróttarligur fyrimunur hjá FC Hoyvík at møta B36 á niðara vølli, heldur enn á ovara vølli. Tí gjørdist tað ein rættiliga óvand støða hjá teimum flestu av teimum 300 áskoðarunum, sum vóru komnir til dystin. Fyri B36-liðið var tað kortini ikki ein so óvand støða at verða á niðara vølli. Liðið venur á niðara vølli einaferð um vikuna, og tað sá ikki út til at darva oddaliðið í vodafonedeildini yvirhøvur. Tað var serliga við smáspælinum mitt á vøllinum, at B36 vann seg í yvirtalsstøður. Beinavegin hevði B36 góðar málmøguleikar, og í 18. minutti kom hol á, tá Jákup á Borg í góðum samstarvi við Christian R. Mouritsen spældi Bárð Olsen fríðan, sum við enn einum skoti uttanfyri brotsteigin beindi bóltin í málið. Seinastu átta minuttirnar skrædnaði veruliga, tá B36 fekk trý mál. Fyrsta lítla korterið í seinna hálvleiki fekk B36 trý mál aftrat, og so var tíðin búgvin at hugsa um næstu uppgávuna. Helst spælir B36 sín heimadyst í hálvfinaluni á ovara vølli í Gundadali, um enn teir vísa seg at trívast væl á niðara vølli í Gundadali.

heris@sosialurin.fo



**COMEBACK**

*Eftir langa skaðapausu, kom dugnaligi miðvallarin, Ingi Højsted, aftur á vøllin fyri B36*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

## Átta fyrrverandi B36-arar við FC Hoyvík

Fyri átta av teimum spælarunum hjá FC Hoyvík, sum royndu seg ímóti B36 ígjár gjørdist talan um eina rættiliga serstaka uppliving, hóast hesir átta og liðfelagar teirra máttu leggja rygg til eitt rættiliga greitt tap. Tummas Hans Rubeksen, Eyðun Højgaard, Janus W. Mortensen, Jørgen Meitilberg, Bogi Hermansen, Jón Brekku, Ásbjørn Gunnarsson og Uni H. Johannesen hava allir roynt seg á besta liðnum B36 í onkrum tíðarskeiði. Fortíðin megnaði tó ikki at gera so nógv við nútíðina, tá samanum kom.

heris@sosialurin.fo